nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir

***Gó›i fitti Petur***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum eisini ein heilsan frá ommu, abba og Høgna muss og klemm
***Frá Jákup Andrias og Jóhan***

***Gó›a elska›a Lív***
Lukku og gle›i vi› tínum 1 ára degni 25.09. Jesus pápi signi› framtí› tína
***Heilsan mamma og babba***

***Gó›i Jákup Andrias***
Hjartaliga tillukku á 5 ára degnum, jesus pápi signi teg, muss og klemm frá
***Ommu, abba og Høgna***

***Gó›a fitta Borgny***
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára fø›ingardegnum 22. sept. Alt ta› besta
***Ynskja omma og abbi í Klaksvík***

***Gó›i elska›i Høgni***
Tær ver›ur ynskt hjartaliga tillukku vi› 20 ára degnum tann 25.09. Jesus signi framtí› tína
***Ynskir omma***

***Gó›i elska›i babba***
Hjartaliga tillukku v› 45 ára degnum sum var í gjár, takk fyri alt
***Heilsan døtrar tínar***

***Gó›a Sunnvá!***
Her ert tú lítil og tannleys, men í morgin fyllir tú 8 ár og ert stór. Hjartaliga tillukku vi› degnum í morgin
***Muss og klemm frá Kristinu***

***Hey Janus***
Ja so bleivst tú 40 ár ha ha. Men tú sært framvegis gott út? Vit gle›a okkum til í kvøld. P.S. minnist tú hesa nátt. Alt ta› besta í framtí›ini
***Heilsan Mr. Bean***

***Gó›a Sunnvá***
Solveig, mamma og omma ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 8 ára fø›ingardegnum

***Gó›i Jóanes***
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum. Her høvdu vit ta› stuttligt? P.S. ein seinka› fø›ingardagsheilsan til damuna aftanfyri. Frá okkum øllum í badm. høllini
***Gigiana***

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum á ymsan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum í juli
***Jógvan Hendrik og Birita***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....
.....
.....
.....
.....
.....

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

## FØÐINGAR

10. sept. fingu Heidi og Henrik Solberg, Tvøroyri, eina dóttur, Emma. Hon var 48 cm. long og vigaði 2250 gr.

13. sept. fingu Edith og Jónfinn Petersen, Argir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

14. sept. fingu Elken Matras, Klaksvík og Kenneth Neshamar, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

14. sept. fingu Súsanna Funding og Rúni Juul Ribe, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

16. sept. fingu Laila og Jan Jacobsen, Tórshavn, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

17. sept. fingu Lina Egholm og Niels Petersen, Horsens, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4480 gr.

18. sept. fingu Randi Ellingsgaard, Havn og Martin Frederiksen, Køge ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3590 gr.

15. sept. fingu Bergtóra Thomsen og Levi Mittelstein, Skopun, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2245 gr.

15. sept. fingu Gunnvá Stoksberg og Hans Egholm, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 47 cm. long og vigaði 2120 gr.

16. sept. fingu Martha og Tummas Pauli Mýri, Aberdeen, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

17. sept. fingu Helen Jacobsen og Joen Magnus Danielsen, Argir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

18. sept. fingu Peter og Jetta Anderson, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3300 gr.

18. sept. fingu Jóna Højsted og Jón Herluf Persson, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3500 gr.

18. sept. fingu Sigvør Lamhauge og Poul Beder, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3000 gr.

19. sept. fingu Katrin og Súni Selfoss, Tórshavn, tvíburðar, døtur. Tann eina var 45 cm. long og vigaði 2350 gr., hin var 43 cm. long og vigaði 1880 gr.

20. sept. fingu Guðrið og Doru á Torvlaðnum, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 5100 gr.

21. sept. fingu Bjørg Mikkelsen og Torleif Thorleifsson, Skála, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 2710 gr.

21. sept. fingu Nicolina og Andrass Skaalum, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3150 gr.

21. sept. fingu Kára og Peter Berthelsen, Lemming, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

21. sept. fingu Hanna Meitilberg Terndrup og Thomas Terndrup í Árhus eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

## ANDLÁT

**14. september**
Sigrid Mouritsen, fødd Johannesen, ættað úr Funningi, búsitandi í Keypmannahavn, 93 ár

**17. september**
Mikkjal Elias Hansen, vanliga nevndur Mikka, úr Hattarvík, 73 ár

**18. september**
Arnhold Hansen, Sørvágur, 92 ár

**19. september**
Alex Lamhauge, Rituvík, 77 ár
Anna Simona Olsen, vanliga nevnd Mona, úr Funningi, 87 ár
Elsebeth Sofía Matras, Klaksvík, vanliga nevnd Fía hjá Heina, 86 ár
Elina Martina Hoffman, fødd Hansen, ættað av Eiði, búsitandi í Frederiksberg, 79 ár

**20. september**
Georg Nielsen Martinson, Egilstaður í Íslandi, ættaður av Tvøroyri, 74 ár
Elsa Vilhelmsen, Klaksvík, 90 ár
Maria Poulsen, fyrrverandi sjúrkasystur, ættað úr Mikladali, 80 ár

## *Eitt ljós á gøtu míni*

*»Eg eri víntræið, tit eru greinarnar; tann, sum verður í mær og eg í honum, hann ber miklan ávøkst, tí at uttan meg kunnu tit als einki gera«.*

Jóh. 15, v. 5

Jesus er kendur fyri alla tíðina í boðskapi sínum at tríva í myndir, líknilsir og sammetingar fyri við teimum at lata upp hjørtuni á sínum áhoyrarum, at teir betri kunnu taka til sín tey gleðiboð, sum hann hevur at geva okkum lut í.

At brúka træið sum mynd ella líknilsi man vera eins gamalt og menniskja er. Træið er ein so sjáldsamur og talandi vøkstur, at hann kann peika okkum menniskjum á tað, sum er støðugt, varandi og álítandi, tí ikki bara kunnu trø gerast elligomul – standa har í mong, mong ættarlið – men eisini kunnu trø yvirliva og standa í blóma, har so mangir aðrir vøkstir uttanum følnaðu, doyðu í raki og tosta, tí trøini kunnu við sínum sevjumikluótum hava samband við dýpdirnar undir jørð, tí ongantíð todna upp. Ikki so løgið, at so mangan er træið sætt sum sambandingarliðið millum tað, sum er her á jørð – tað, sum er í dýptunum undir jørð sum tað, ið er uppi í himmalsku hæddunum, sum trøini við greinum sínum eisini kunnu peika okkum ímóti.

Nú er í Jesu orðum ikki talan um træið sum so, men um víntræið – hetta træið, ið fyrst og fremst umboðar gleðina og tað gleðiliga, eisini sambært Jesu orðum her: »Hetta havi eg tala til tykkara, til tess at gleði mín kann vera í tykkum, og gleði tykkara kann verða fullkomin«. Og tað gleðiliga Jesus vil peika á við myndini av víntrænum er, at hóast hann nú má fara frá lærusveinunum, so skulu vegir teirra kortini ikki skiljast.

Eisini framyvir fer Jesus sum hin upprisni at fylgja teimum, ja so neyvt skal sambandið verða teirra millum sum træið og tess greinar eru og verða óatskiljandi. Har skal eisini framyvir, ja alt til veraldar enda verða ein felagsskapur millum hin upprisna og fólk hansara, har vit sum greinar skulu kenna okkum lívgaðar og uppihildnar í lívssambandinum við træið – har tað altíð verður galdandi, »at uttan meg kunnu tit als einki gera«. Og fyri at kunna avmynda hesa óslítandi framtíðar eindina, hvat er tá fyri einum suðurlendingi natúrligari enn at hugsa um træið og greinarnar? At missir greinin sambandið við træið, er hon deyðadømt, tí tað er úr trænum, at hon fær tikið til sín alt tað, sum henni er tørvur á fyri at verða verandi á lívi.

Og so er spurningurin, um ikki myndin av trænum og greinunum eisini kann vendast við: at ikki bara greinin má hava lívssamband við træið, men at eisini sjálvt træið er og verður knýtt at greinunum. Hvat er eitt træ uttan greinar, og eru tað ikki vit, ið sum greinar eru settar at umboða og mynda træið úteftir? Eru tað ikki vit gróðursettu, ið skulu verða trænum greinar? Í lívi og deyða at peika á hin krossfesta og upprisna, og gera hansara grening, inntil hann kemur?

**Martin R. Jacobsen**

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 14. sunnudag eftir Trinitatis

*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Christianskirkjan:* kl. 11,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Mikladalur:* kl. 12 lestur
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Nólsoy:* kl. 12, Elsa Funding
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
*Hósvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Hvalvík:* kl. 12, altarg., Marjun Bæk. (Í Hvalvíkar kirkju gongur talvan fyri sunnudagsskúlan)
*Vestmanna:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Kirkja:* kl. 12, konfirmatión og fráfaringargudstænasta,
*Hattarvík:* kl. 18, altarg., fráfaringargudstænasta, Meinhard Bjartalið
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, Jógvan Fríðriksson. (Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju kl. 12)
*Bøur:* kl. 11, David Johannesen
*Leirvík:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Fámjin:* kl. 12, Petur M. Rasmussen. (Talvan gongur fyri Sjómanskirkjuna)
*Dalur:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Argir:* kl. 11, Heri Joensen

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti, kl. 22 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin við luttøku av Jógvan Júst Rasmussen, trúboðara á Filipsoyggjunum.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Limafundur við Hellu Olsen
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma við Anniku og Steingrím Niclasen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Meinigheitshúsið í Havn
Einki møti sunnukvøldið 24. sept. vegna ársmøtini hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum við Landavegin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við Karstin Olgar Lamhauge.
Mánakvøldið venur Manskórið kl. 19.55.
Týskvøldið verður bíbliutími kl. 20 við Flemming Møller
Mikukvøldið venur Meinigheitskórið kl. 19.
Hóskvøldið verður ungdómsmøti kl. 20 við Sverra Steinhólm. Evni: Hvat er mær loyvt?

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti, Sofus Steingrund talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Øll samkoman syngur.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 23 Gospel night við Jan Honningdal o.ø.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.
Mánadag til fríggjadag frá kl. 8.30-9.30 morgunbøn. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti har Annika við Skipá talar.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 18 fundur.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Sam Jacobsen talar.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Filadelfia, Sundalagi
Møti verður í morgin kl. 18 í Hósvík, Saron í Vestmanna hevur møti.

### Kollafjarðar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Regin Høgnesen og Torbjørn Láadal.
Týsdagin kl. 20 bíbiltími, Jóh. ev. 3.

### Missiónshúsið í Leirvík
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við Una Næss. Aftaná verður hugnaløta við undirhaldi og drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygardagin fer bussurin frá Kelduni kl. 16.30 til Havnar á Gospel festival.
Sunnudagin . 17 møti við Ann-Randi Jacobsen og øðrum. Barnamøti kl. 17.
Mánakvøldið kl. 19 ungdóms-alfa.
Týskvøldið kl. 20 møti við Jan Honningdal.
http://www.keldan.fo

### Skúlin í Lamba
Sunnudagin kl. 14 møti við John Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Havstein Ellingsgaard. Øll eru vælkomin.

### Hæddin, Saltangará
Bíbliuskeiðsrøðin yvir evni Hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini Saltangará.
Møtirøðin byrjar leygarkvøldið tann 23. sept. kl. 19.
Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við John Vilhelmsen.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Ruth og Eskild, Hvalvík.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

### Thabor, Fuglafjørður
Møti sunnukvøldið kl. 18 við John S. Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

### Betania Skopun
Sunnudagin kl. 10.15 sunnudagsskúli, kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti. Øll eru vælkomin.

### Zion, Sandur
Sunnudagsskúli kl. 13.30.

### Suðuroy
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast leygardagin 23. sept. kl. 18 í missiónshúsinum á Tvøroyri. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Á møtinum í missiónshúsinum sunnudagin kl. 18 talar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari. Øll eru vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sigrid Ludvig og Hanni Thomassen.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

### Sion, Vágur
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11, sunnudagsskúli kl. 11.30 og møti kl. 16.
Telefonandakt 373 777.